Eitt av endamálum samkomunnar er læra (matt. 28:19-20). Tí vilja vit bjóða nógvar og fjølbroyttar møguleikar at læra um Harran Jesus Kristus í samkomuni.

Jógvan Zachariassen skipar fyri tiltakinum, og flestu lærararnir verða úr Lívdini.

Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, bøn og læru og bjóða øðrum - bæði ungum og gomlum - við.

Eisini verða skeið og ráðstevnur ein regluligur partur av læruni í Lívdini. Hetta verður lýst hvørja ferð.

## samkoman lívdin

oman hoydalar 28
(við vegin langa)
fo – 188 hoyvík



Týskvøld frá kl. 18:50 til kl. 20:20

- undirvísing
- hugsa & samtala
- endi & samfelag

Lívdin ynskir – á viðkomandi, frælsan og ábyrgdarfullan hátt – at gera lærisveinar, sum dýrmeta Gud við at liva Guds endamál, breiða út frelsuætlan Hansara, hjálpa og vísa umsorgan.

lívdin
- í lívd hins hægsta

www.livdin.fo



# undirvísing & samtala týskvøld í lívdini

mars - juni 2011

# evnir og tíðir

Fýra ymisk evni verða viðgjørd fyrru hálvu í 2011. Tey eru “Hvussu er Gud?”, “Fortaping”, “Gávur Guds” og “Mítt samfelag við Gud.” Fyri ikki at binda fólk øll týskvøld verður undirvíst í hvørjum evni trý týskvøld. Kyknubólkar koma inn í millum. Evnini eru sjálvstøðug, men tó samanhangandi. Evnini geva eina góða heildarmynd og innlit í nøkur grundleggjandi evni, sum Bíblian lærir. Bøn okkara er, at hetta verður til uppbygging, sannføring og troyst.

# týskvøld

Undirvísing 18:50-20:20 → Steðgur 20:20-20:30 → Bønarløta 20:30-22:00






**mars**

1. Kyknubólkar
8. Hvussu er Gud? – Faðirhjarta Guds
15. Hvussu er Gud? – Sinnalag Jesusar
22. Kyknubólkar
29. Hvussu er Gud? – Kraft Andans

**apríl**

5. Fortaping – Avleiðingin av synd
12. Kyknubólkar
19. Fortaping – Tørvurin á frelsu
26. Fortaping – Lagna Satans

**mai**

3. Kyknubólkar
10. Gávur Guds – Samkoman
17. Gávur Guds – Bíblian
24. Kyknubólkar
31. Gávur Guds – Afturkoma Jesusar

**juni**

7. Mítt samfelag við Gud – Hvat er, at synda móti Heilaga Andanum?
14. Kyknubólkar
21. Mítt samfelag við Gud – Hvussu kenni eg vilja Guds?
28. Mítt samfelag við Gud – Hvussu hoyri eg rødd Guds?